# Kall í jólahýri

Kall hevur nú fimm ár á baki á føroyska fjarskiftismarknaðinum. Tað hevur felagið valt at markera við fýra ymsum jólapakkum, sum kunnu keypast í Kall-handlunum kring landið.

Talan er um fýra rættiliga fjølbroyttar pakkar. Tann minsti av hesum inniheldur ikki nakra telefon, men tað gera hinir tríggir. Har er talan so eisini um sera góð tilboð, har keyparin umframt sjálva telefonina eisini fær talu tíð og tey 1000 SMS'ini, sum Kall vanliga bjóðar. Hartil er fløgan hjá gentubólkinum, PoppKorn eisini við í pakkanum.

Umframt serligu pakkatilboðini, so hava Kall-handlarnir sjálvandi eisini alt annað, sum hoyrir fjarskifti til. Bæði innan fartelefonir, Ipod's, routarar ogg teldur. Eisini hevur felagið nethandil, har til ber at keypa vørurnar, meðan kundin situr við telduskíggjan.




























